GJALDSTOVAN

# Rammusáttmáli fyri

keyp telduútgerð hjá landinum

des. 2021

# Innihald


1 Partarnir .......... 3

2 Grundarlag .......... 3

3 Tíðarskeið .......... 3

4 Vavi .......... 3

5 Heimild .......... 4

6 Innkeyp .......... 4

7 Bíligari tilboð .......... 5

8 Hagtøl og frágreiðingar .......... 6

9 Samstarv .......... 6

10 Broytingar í prísum og vørum .......... 6

11 Broytingar í vørulistanum .......... 6

12 Broytingar í sáttmálanum .......... 7

13 Force Majeure og týðandi mishald .......... 7

14 Avhenda til triðja part .......... 7

15 Trúnaður .......... 7

16 Endurgjald .......... 8

17 Træta .......... 8

18 Undirskrift .......... 9

# 1 Partarnir

Útbjóðari: Gjaldstovan við Keyp Landsins

Kvíggjartún 1

160 Argir

V-tal 343269

Ábyrgdari: Kim Hansen Fulltrúi, kim@gjaldstovan.fo , +298 281581.

Veitari: Sp/f KT Húsið

Grønlandsvegur 5

100 Tórshavn

V-tal: 597570

Ábyrgdar: Sveinur Thomassen, sveinur@kthusid.fo, +298 555554

# 2 Grundarlag

Grundarlagið millum partarnar er:

- Rammusáttmálin: Fylgiskjal A – "20211227 - Rammusáttmáli fyri telduútgerð - Gjaldstovan og KT Húsið"
- Vørulisti: Fylgiskjal B - "KTH - 20211011 - vørulisti - telduútgerð"

# 3 Tíðarskeið

*Stk. 1.* Rammusáttmálin byrjar 1. januar 2022 og endar uttan ávaring 31. des. 2024.

*Skt. 2.* Rammusáttmálin kann leingjast upp til 1 ár um partarnir eru samdir um tað.

*Stk.3.* Rammusáttmálin kann nær sum helst sigast upp við 3 mánaðar fráboðanarfreist til síðsta í mánaðinum. Uppsøknin skal vera skriftlig.

# 4 Vavi

*Skt. 1.* Rammusáttmálin fyri innkeypsskipanina av telduútgerð fevnir um allar vørur, ið eru nevndar vørulistanum. Talan er um vanliga telduútgerð i samband við eitt vanligt arbeiðspláss. Talan er ikki um teldútgerð sum er til serliga nýtslu, t.d. tól, ið seta serligan tørv til útgerðina.

*Stk. 2.* Rættin til at keypa inn eftir hesum sáttmála hava øll, ið eru bundin av "Rundskriv nr. 9003 frá 1. Juli 2019 um keyp av vørum og tænastum", undantikið er Sjúkrahúsverkið.

*Stk. 3.* Aðrir almennir stovnar o.o., ið ikki eru bundin av rundskrivinum, kunnu brúka sáttmálan á frívilligum basis.

*Stk. 4.* Gjaldstovan kann av sínum eintingum, og uttan umkostningar, loyva brúkarum at nýta sáttmálan, t.d. kommunum, skúlum, næmingum o.s.fr.

*Stk. 5.* Gjaldstovan, stovnar o.o. eru IKKI bundin, at keypa ávísa mongd av nakrari vøru.

# 5 Heimild

*Stk. 1.* Gjaldstovan bindir stovnar undir landinum í samsvar við "Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum", til bert at keypa vørur, fevndar av hesum sáttmála, frá Veitara, so leingi sáttmálin er galdandi, undantikið er Sjúkrahúsverkið.

*Stk. 2.* Er Veitari vitandi um at keyp, bundið av hesum sáttmála, fer fram uttanum sáttmálan, hevur Veitari skyldu til at boða Gjaldstovuni frá skjótast møguligt.

*Stk. 3.* Stovnar, ið hava rætt at brúka rammusáttmálan, kunnu handla vørur, fevndar av sáttmálanum, sínamillum.

# 6 Innkeyp

*Stk. 1.* Veitari skal hava heimasíðu, har alt innkeyp, og bara innkeyp, eftir hesum sáttmála fer fram. Veitari hevur skyldu til, uttan kostnað fyri Gjaldstovuna ella stovnar, at gera sítt til, at heimasíðan altíð er virkin.

*Skt 2.* Um tað av einhvørjari orsøk ikki er møguligt at keypa umvegis heimasíðuna, skal vera møguligt at bíleggja vøruna umvegis teldupost ella telefon, og Veitarin hevur skyldu, uttan drál, at skrásetta hetta í skipanini eftirfylgjandi.

*Skt. 3.* Til hvørja vøru, skal í minsta lagi vera møguligt at síggja eina greiða vørulýsing og prís við og uttan MVG.

Stk. 4. Keyparin skal fáa ein ordraváttan og kann broyta í henni innan kl. 16 fyrsta arbeiðsdag eftir bíleggingadagin.

Stk. 5. Til hvønn ordra, skal við viðfestast ein fylgiseðil, ið inniheldur:

- Navn á Veitara
- Navn og nummar á rammusáttmála
- Navn og nummar á stovni
- Adressuupplýsingar á stovni

- Vørunavn og nummar
- Fakturanummar
- Fakturalinjunummar
- Tal av vørum
- Prísur við og uttan MVG
- Dato fyri bílegging
- Seriunummar
- Saksnummar (Gjaldstovan)

Stk 6. Allar rokningar til stovnar, skulu vera í formatinum OIO-UBL. Aftrat vanligu fakturaupplýsingunum, skal rammusáttmáli og stovnur framganga.

Stk. 7. Gjaldsfreistin er 30 dagar pluss inniverandi mánaða.

Stk. 8. Vøran skal avhendast á adressuni hjá brúkarinum í Tórshavnar økinum, uttan umkostningar, millum kl. 9-16 ella eftir nærri avtalu. Aðrastaðni í landinum eftir nærri avtalu.

Stk. 9. Veitarin skal hava møguleika fyri, at skráseta teldurnar í InTune.

Stk. 10. Um ikki annað er avtalað, er veitingartíðin:

- 1-3 teldur, skýggjar, dockingstøðir, keyboard og mús, 1 dag
- 3-10 teldur, skýggjar, dockingstøðir, keyboard og mús, 10 dagar
- Fleiri enn 10 teldur, skýggjar, dockingstøðir, keyboard og mús, 21 dagar
- Annað 1-5 dagar

Stk. 11. Veitarin kann ikki krevja, at stovnur setir seg í samband við undirveitara í samband við garanti o.l.

Stk. 12. Umvælingar skulu verða lidnar áðrenn 30 dagar frá tí at vøran er flýggja veitarinum. Stovnur skal fáa tilsvarandi vøru tøka í tíðarskeiðnum. Kann vøran ikki umvælast, skal Veitarin avhenda vøruna aftur til stovnin.

# 7 Bíligari tilboð

Stk. 1. Veitari kann ikki marknaðarføra og selja aðra líknandi vøru til stovnar, um vøran er umfata av rammusáttmálanum.

Stk. 2. Velur veitarin at selja vørur á vørulistanum bíligari enn sáttmálin ásetur, t.d. í samband við kapanjutilboð, hava stovnar umfataðir av rammusáttmálanum rætt til sama prís, og skulu samstundis fáa hetta upplýst í samband við keyp. Veitarin hevur skyldu, at fáa hetta skrásett saman við aðrari skráseting.

## 8 Hagtøl og frágreiðingar

*Stk. 1.* Í seinasta lagi 30. januar á hvørjum ári, skal veitarin lata inn eina frágreiðing um sølugongd o.tíl.

*Stk 2.* Um umbiðið verður um hagtøl í úrtíð, so skulu tey flýggjast innan 5 yrkadagar uttan kostnað.

*Stk. 3.* Hagtølini skulu skipast eftir sama leisti, sum eru á fylgiseðli í samband við keyp. Og skulu latast inn sum Excelfíla.

## 9 Samstarv

*Skt. 1.* Veitarin skal áseta kontakpersón, ið hevur ábyrgd av rammusáttmálanum.

*Stk. 2.* Veitarin og ábyrgdari skulu skipa fyri, og hava ábyrgd av, at øll sølustarvsfólk o.tíl. kenna til rammusáttmálan.

Stk. 3. Ábyrgdari skal hava fulltrú at taka avgerðir Veitarans vegna.

Stk. 4. Um Veitarin móttekur klagu frá stovni, so skal Veitarin senda skrivliga fráðgreiðing til Gjaldstovuna innan 5 yrkadagar.

Stk. 5. Broyting í stovnsheitum, ella um økir verða undantikin "Rundskriv nr. 9003 frá 1. juli 2019 um keyp av vørum og tænastum" hevur ikki ávirkan á sáttmálan.

Skt. 6. Partarnir eru samdir um at samstarva á ein skikkaðan hátt, halda ásetingar í hesum rammusáttmála og uppihalda neyðug krøv fyri virkseminum. Broyttar fyritreytir, sum kunnu viðføra, at annar parturin ikki kann halda sín part av avtaluni, skulu fráboðast hinum partinum so skjótt gjørligt.

## 10 Broytingar í prísum og vørum

Stk. 1. Prísjavning kann bert fara fram 1. januar, og skal fylgja prístalinum "09.1.3 útgerð til kunningartøkni" frá Hagstovu Føroya. Javningin kann bert fara fram í samráð millum báðar partar, og skal góðtakast av Gjaldstovuni í hvørjum einstøkum føri.

Stk. 2. Partarnir velja at koyra við opnum prísum. Veitari gevur Gjaldstovuni fult innlit í prísstrukturin.

Stk. 3. Í samband við broytingar í prísunum, skal Veitarin altíð seta seg í samband við Gjaldstovuna áðrenn broytingar verða gjørdar. Eisini í samband við avgjøld o.tíl., ið Veitari og Gjaldstovan ikki hava ávirkan á.

## 11 Broytingar í vørulistanum

Stk. 1. Vørur kunnu blíva strikaðar um vøran gongur út (End of life) ella um Veitarin ikki hevur møguleika at selja vøruna longur (End of sale).

Stk. 2. Um vøra verður strika av vørulistanum, bindur Veitarin seg til at bjóða nýggja vøru (substitutión), sum í allar mátar livur upp til dygd, prís o.a. sum strikaða vøran hevur.

Stk. 3. Møguleiki skal eisini vera fyri at leggja vøru aftrat vørulistanum um Gjaldstovan ynskir tað.

Stk. 4. Allar broytingar í vørulistanum skulu góðkennast av Gjaldstovuni, áðrenn tær verða settar í verk.

## 12 Broytingar í sáttmálanum

Stk. 1. Broytingar í hesum rammusáttmálanum skulu fráboðast við rímiligari freist, og verða gjørdar við einum ískoyti til hendan sáttmálan.

Stk. 2. Opinlýsir feilir í hesum rammusáttmálanum, fylgiskjølum osfr. t.d. skeivar tilvísingar ella sláfeilir, kann Gjaldstovan broyta uttan at veitari skal góðkenna hetta. Tó skal veitarin verða kunnaður.

## 13 Force Majeure og týðandi mishald

Stk. 1. Týðandi mishald verður mett í mun til galdandi praksis og lóggávu. Tó altíð um talan er um: brot á trúnað, vantandi lýdni í mun til lóggávu, óreiðiligur atburður og brot á sáttmálan, sum eftir eina ávaring ikki verður rættað.

Stk. 2. Partarnir kunnu ikki ábyrgdast fyri mishald orsakað av force majeure.

Stk. 3. Force majeure ger seg galdandi tá tað er ómøguligt at fylgja sáttmálanum orsakað av kríggj, natúrhendinugum, eldi, verkfalli, verkbanni o.tíl.

Stk. 4. Partarnir hava skyldu til at manna tilbúgving um neyðugt.

Stk. 5. Partarnir bera sjálvir útreiðslur av tapi, ið skyldast Force Majeure.

## 14 Avhenda til triðja part

Stk. 1. Partarnir kunnu ikki avhenda nakrar av sínum skyldum sambært sáttmálanum til triðja part, uttan skrivliga góðkenning frá hinum partinum.

Stk. 2. Gjaldstovan kann altíð afturvísa triðja part. Sjálvt um viðkomandi uppfyllir skyldurnar í sáttmálanum og útboðstilfari.

## 15 Trúnaður

Stk 1. Gjaldstovan er fevnd av "Løgtingslóg nr. 133 frá 10. juni 1993 um innlit í fyrisitingina".

Stk 2. Partarnir hava tagnaskyldu um viðurskifti, sum partarnir fáa innlit í hjá hvørjum øðrum umvegis samstarvið eftir hesum rammusáttmála, og sum eftir teirra natúr ella lóggávu eiga at vera hildin í trúnaði.

Stk. 3. Tagnarskyldan heldur fram eftir, at sáttmálin fer úr gildi.

# 16 Endurgjald

Stk. 1. Báðir partar hava endurgjaldssábyrgd í fylgi føroyskari lóggávu.

Stk. 2. Um Gjaldstovan sigur sáttmálan upp vegna mishald frá veitara, so skal veitari dekka tapið landið og stovnar fáa av hesum.

Stk. 3. Gjaldstovan átekur sær ikki ábyrgd vegna tey, ið sjálvboðin kunnu gera brúk av rammusáttmálanum.

Stk. 4. Gjaldstovan kann ikki ábyrgdast yvirfyri triðja parti og mishald ella aðrar skyldur í mun til aðrar sáttmállar ella líknandi, ið Gjaldstovan ikki varar av. Veitarin heftir sjálvur yvirfyri sínum undirveitarum, og møgulig konsortier hefta solidarisk.

# 17 Træta

Stk. 1. Er talan um trætu, so skal semja sovítt gjørligt søkjast við samráðingum.

Stk. 2. Bera samráðingar ikki á mál, skal trætan loysast endaligt við dómstólarnar.

# 18 Undirskrift

**Gjaldstovan**

28-12-2022
Staður og dato

Undirskrift

STJÓRI LEIF ABRAHAMSEN
Tittul og navn á undirritara

**Veitari**

28/12-2021
Staður og dato

Undirskrift

Nevndarform. Sveinur Thomsen
Tittul og navn á undirritara